


# Poul Andreas Restorff, tann ov góðsligi keypmaðurin

**Ein av teimum sum luttók í søguligu konsertini 2. jóladag 1907, tá ið okkara tjóðsangur varð framførdur fyrstu ferð, var Poul Andreas Restorff. Vit fara at lýsa hann við frásagnum hjá systirsonunum William Heinesen og abbadótrini Oddvør Johansen.**



ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo



*Handilin aftaná umbyggingina í 1959. Myndin er frá 1961. Aftast f.v. Gunleyg Hansen úr Nólsoy og Oddvør av Glyvrum, Andreas Restorff. Fremri Hjørdis Thomsen, seinni Eide úr Gøtu. Poula Abrahamsen, seinni Samuelsen, úr Fuglafirði. Sonja úr Sumba og fremst Selma úr Klaksvík. Smágentan við vektina Súsanna Restorff, dóttir Trygva.*



*Gravsteinurin:*

*Poul Andreas Restorff*
*f. 12-9-1876 d. 6.6. 1929*

*Susanne H Restorff*
*f. 18-7-1887 d. 23-9-1970*



*Upprunaligi handilin. Við skivuna standa Denna Mohr, kona Kjartan Mohr, og Poul Andreas Restorff. Inni í handlinum stendur Frida Samuelsen kona Sámal á Smirli. Uttan fyri skivuna: Tann ungi maðurin er Jacob Joensen, á Borg. Tann gamli maðurin er møguliga Suðuroyar-Johann*



*Hendan myndin av húskinum er tikin í 1921. Tey eru f.v.: Ebba, Sanna við Trygva, Niels, Andreas, Rigmor, Poul og Marin, dóttir Fanny, systir Poul, sum vaks upp hjá teimum.*

## William skrivar:

Onkel Poul var et muntert og elskeligt menneske. Han var musikalsk, spillede violin og havde en lys baryton, og var et ubestrideligt dille tantskuespillertalent. Han var uddannet som handelsbetjent og arbejdede i sin ungdom i M. C. Restorffs handel i Frederiksvåg.

Jørgen Frants (Jacobsen), der lige som jeg selv holdt meget af Poul, kaldte ham en Mozartsk figur, og karakteristikken rummer megen alvor. P. A. Restorff var naivt troskyldig, men han hvilede på en karakteristisk måde "kunstnerisk" i sig selv, udstrålede i sine bedste stunder et overdådigt smittende humør og havde i sin store bekendtskabskreds kun venner og beundrere. Han efterlader sig i sit ægteskab med Sanna Holm fra Kvalbø sønnerne Andreas, Niels og Trygvi samt døtrene Ebba og Rigmor. Alle børnene, ikke mindst døtrene, har arvet faderens eminente humoristiske efterlignelsesevne og musikbegavelse. Dette sidste angår især Rigmor.

## Sebastians hús

Oddvør Johansen er abbadóttir P. A. Restorff. Hon hevur skrivað fleiri bøkur um sína ætt og um gomlu Havnina. Millum hesar hevur hon skrivað bókina Sebastians Hús, sum júst er um húsið og handilin í Sigmundargøtu, sum enn eitur P. A. Restorff.

Poul byrjaði at handla í 1919 á Landavegnum 3. Í 1920 flytir hann handilin hagar, hann er nú. Bygt varð uppi húsini hjá foreldrunum hjá Poul, Helenu og Andreas W. Restorff. Her hevði Helena eina lítla breyðbutikk, har hon seldi breyð frá bakarínum hjá Frants Restorff. A. W. Restorff hevði tá tann handilin í Bringsnagøtu, sum vit kenna sum handilin hjá Katrinu Christiansen.

Í bókini hjá Oddvør verður Poul kallaður Mourits. Um nýggja handilin skrivar hon:

*"Ein nýggj ølbutikk verður latin upp her og bryggjarí gjørt í tí gamla kjallaranum. Her bryggja tey veikt øl og pasturisera tað. Gentubørnini skilja fløskur í stórum kørum við kaustikk-sodalúti, og ølið verður tappað við hond. Til endans verður proppað, og teir kviku fingrarnir gera sodavatn: Sjabeso, limonadu og appelsinsquash.*

*Sjálvur handilin er rúmligur við alkyns nýmótans greiðum: petoleumspumpu, pengakassa sum ringir, tá ið skuffan fer upp og hondriknari kaffimyllu.*

*Mourits er lukkuligur. Hann er sum fuglurin á morgni, gingur bríkslandi og vigar korn av, meðan ovnurin hitnar. Góða konu og vøkur børn, egnan handil og egið bryggjarí. Mourits er vælsignaður við einum ljósum sinnalagi og hevur av somu orsøk fólkaeydnu, hvar hann vendir sær.*

*Mourits letur kundarnar skriva. Tað frættist skjótt víða um. "Far út í Mouritsarhandil, har fært tú uppá kreditt." Kreditt er eitt deiligt orð. Í staðin fyri at gjalda kanst tú skriva, og nú ið tíðirnar eru ringar verður skrivað av grimd...*

*Tá ið fimm ár eru farin fer handilin í gjaldssteðg. Børnini verða nú send út við rokningum.*

*Tey smáu træhúsini geva seg undan krøvunum, og konurnar gremja seg. Vørurnar eru langt síðani etnar og brúktar. "Á, vælsignaða barnið, kom aftur um tvær vikur, ha!" "Góðasti tú, vit hava ongar pengar beint nú. Kom aftur í næstu viku."*

*Illir menn við lodnum hondum síggja grískir út og skelda. Mouritsarhandil er ein svindilfyritøka og einki annað. Snítarar og bedragarar er alt harkaliðið sum tað er. Tað kanst tú heilsa og siga.*

## Andrias tekur yvir

Sum skilst var trupulleikin hjá Poul, at hann var alt ov góður av sær, og tað riggar ikki altíð í forrætning. Handilin hórar undan í fyrsta umfari, tí mamma Poul setur sínar sparipengar í handilin.

Í 1929 er heimskreppa og ein av mongum húsagangum var handilin hjá Poul Restorff. Sama ár gerst hann sjúkur og doyr.

Sonurin Andrias er farin út í heim at sigla, og hann sær fyri sær eina spennandi framtíð á sjónum. Men ein dag fær hann fjarritið: "Kom heim. Pápi tín er deyður. Handilin stongdur." Tað stóð nógv á honum. Men hann hevði einki val. Heima høvdu tey einki at liva av, og hann var tann einasti, sum kundi fáa handilin aftur í gongd.

Hann kemur heim og býtir tenninar saman. Við hjálp frá Gudi og góðum fólki fáa tey handilin í gongd aftur. Bankin eigur alt, men Andrias setur sær fyri at gerast skuldarleysur eftir 10 árum. Í 1933 stendur aftur á, men síðan eydnast at koma undan, og tey eiga aftur hús og handil.

Andrias rak handilin alla sína tíð. Tað var tó eingin at taka við eftir hann, og tískil gjørdust tað Davina og Johan Mikkelsen, sum nú hava handilin.

**Komandi partur**

Komandi partur fer at snúgva seg um gamla M. C. Restorff. Hetta er ein heilt heilt serlig søga um, hví hann liggur einsamallur í gamla kirkjugarði, meðan konan liggur grivin fyri høvuðsdyrnar í Havnar Kirkju.